## DAGSINS MEINING

# Prioriteringslistin

Spennandi verður at síggja hvussu samgongan fer at raðfesta í komandi fíggjarlóg, nú hon hevur gjørt tað heldur ivasama fyri ikki at siga ábyrgdarleysa, at hon hevur skarvað hálvtfjórðhundrað milliónir av blokkinum samstundis sum millardrokning liggur fyri framman og heimsbúskapurin gongur illa.

Nøkur øki mugu raðfestast hægri enn tey hava verið – eitt nú almanna og heilsumál og skúlamál, har standurin ikki hevur verið framúr góður seinastu árini. Einasta øki, har stórvegis vøkstur eftir øllum at døma hevur verið góðtikin er í miðfyrisitingini. Tað tykist løgið, at vit í dag hava eina miðfyrisiting, ið er tíggjutals milliónir dýrari enn fyri fáum árum síðani, meðan tað, ið fyrisitið verður, ikki er størri í eitt nú seingjarplássum á sjúkrahúsum o.l. Við øðrum orðum er almenna tænastan pr høvd í miðfyrisitingini lækkað. Hetta er ikki einum vælferðarsamfelagi til nakran sóma.

Vit mugu ikki gloyma, at vælferðarsamfelagið hevur nakrar grundfunktiónir, ið eiga at verða í lagi óansæð um tað eru góðar ella ringar tíðir. Øll hava krav uppá eina ordiliga skúlagongd og øll hava krav uppá eitt virðiligt lív, eisini í sjúku og ellisárum.

Alt gott um at orða ein politikk inann hetta og hatta, men alt til sína tíð. Tað er ikki rætt at endurskoða vælfungerandi lógir og kunngerðir og niðurseta arbeiðsbólkar til at orða ting, sum eru góð at hava og ikki eru orðaði fyrr, meðan tað alneyðuga sosum at fáa skúlaverkið at uppfylla krøvini í Fólkaskúlalógini liggur á láni.

Politiskt má raðfestingin verða í lagi og hevur serliga vinstrivongurin í Løgtinginum eina torføra uppgávu, tí ikki nyttar at innføra nýggjar imponerandi glansskipanir, um hornasteinurin undir vælferðarsamfelagnum spakuliga syndrast vegna ov lágari játtan til stovnarnar undir miðfyrisitingini ár eftir ár.

Tað er greitt at sera torført verður at koma afturumaftir Finn Norman Christensen bygnaðin, tí at tað eru tíverri nógv, ið feilaktugt javnseta bygnaðin við Stýriskipanarlógina. Bygnaðurin er bert ein funktión av stýriskipanarlógini, og kann bygnaðurin endurskipast við fleiri tvørfunktiónum, felags innkeypi o.s.fr. Eitt er greitt, føroyska samfelagið hevur ikki ráð til bygnaðin sum er, og hevur ei heldur nóg nógv fólk til ein slíkan bygnað. Peningur og ábyrgd má trýstast longur niður í skipanina, so at stovnar og sjúkrahús ikki hvørt ár standa og noyðast at hótta við uppsøgnum, meðan miðfyrisitingin veksur.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Olivant sum tíðindaberi

**Jákup Fróði Djurhuus**



Føringar ferðast nógv uttanlands. Tað vísa hagtøl. Ì arbeiðsørindum á sjógvi og landi. Ì lestrarørindum, í sjúkraørindum, at vitja familju, vinir og kenningar o.sfr. Summi eru burturstødd í longri tíðarskeið.

Tíðindatænastan Olivant hjá Føroya Tele, átti eftir mínum tykki at vera ein kærkomin møgulleiki hjá hesum stóra skara av fólki at kunna fylgt við tí sum hendir í Føroyum meðan tey eru burturstødd. Tað hevði verið kundatænasta á høgum støði – eisini fyri fólk herheima, sum hava atgongd til alnótina.

Tað átti at verið møguligt við eini effektivari redaktión, sum endurgav høvuðstíðindi frá bløðum og loftmiðlum, og sum enntá kundi lagt nøkur nýggj føroysk tíðindi aftrat.

Fyri mær sær tað ikki út til at vera nøkur sum helst redaktionell linja á hesi tíðindatænastu í løtuni. Og fari eg skeivur, so vildi eg fegin fingið at vita, hvør í henda linja er.

Tað kann vera mikið spennandi at lesa um hvussu deyðir hávar týggja sær á útlendskum matstovum, og hvussu tað gongst at grøða stórutá á onkrum útlendskum fótbóltsleikara, men tað kundi td staði í Fregnum, har somu høvundar levera í spannavís av tíðindum sum hjávinnu.

# Stórur barnadagur á Frælsinum

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 8. september kl. 14.00 skipa næmingar á Læraraskúlanum fyri barna - og familju tiltaki á grasvøllinum á Frælsinum. Á skránni verða neytalortakapping, køkutombola, klintriveggur, hoppiborg, togtogan, posarenning, seymsláing og onnur smáspøl. Kl. 15.00 verður eitt lamb í heyst selt á meksikanskari uppboðsølu. Nøkur av tiltøkunum verða ókeypis. Eisini ber til at keypa sær ein kaffimunn, saft og køkur. Peningurin, ið kemur inn av tiltakinum, verður brúktur til námsferð til Róm seinni í heyst.

# Antiklutir á Torginum

TÍÐINDASKRIV

Mánadagin og týsdagin er Torgið í SMS karmur um spennandi og forkunnuga søluframsýning av góðum og gomlum lutum. Tað er Katrin Gulklett, sum er búsitandi í Danmark, sum hevur søluframsýningina. Katrin hevur altíð havt sera stóran áhuga fyri gomlum lutum. Sjálv samlar hon uppá gamlar postalínsdukkur og gamlar týskar nipsfigurar. Afturat hesum hevur hon eina rúgvu av gomlum lutum liggjandi, s.s. lampur, vasar, nipsting og figurar, sum hon so selur á slíkum framsýningum, sum henni í SMS.

Av tí at Katrin altíð hevur havt áhuga í gomlum lutum, hevur hon eisini eina serliga breiða vitan innan hetta øki. –Hetta er mítt ítrív, og tað eg havi ein brennandi áhuga. Tí havi eg eisini stóra vitan innan øki. Og tað er ein fyrimunur, tá tú selur gamlar lutir. Er tað t.d. onkur, sum gjarna vil vita, hvussu gamal onkur lutur er, sum viðkomandi eigur, eru tey hjartaliga vælkomin framvið, og eg hjálpi teimum gleðiliga, sigur Katrin. Lutirnir, sum Katrin selur á Torginum í SMS hesar báðar dagarnar, eru góðir og gamlir. Einki er yngri enn 50 ár, og alt er í góðum standi, sigur Katrin. Umframt gomlu lutirnar hevur hon eisini hevur hon nakað av gomlum prýðum við sær. Um prísleguna, sigur Katrin, at hon spennir vítt. - Heilt úr tíggju krónum upp til eini tvey túsund, so tað skuldi verið okkurt til øll. Av merkjum kunnu nevnast Søholm, Royal Copenhagen, Bing og Grøndahl og mong onnur kend merkir.

Framsýningin á Torginum í SMS er opin frá kl. 10.00 til 17.30 báðar dagarnar, og tá ber eisini til at hitta Katrina.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Mars Chaser komin

**Um middagsleitið í gjár kom seinasta skipið í føroyska flotanum, Mars Chaser, á Miðvág**

SKIPAKEYP

Enn eitt skip kom í gjár í føroyska flotan. Tað er vaktarskipið Mars Chaser, sum sandavágsmenn hava keypt úr Íslandi.

Um middagsleitið kom Mars Chaser á Miðvág úr Reykjavík. Talan er um fyrrverandi íslendska havrannsóknarskipið Árna Friðriksson, sum eitt felag í Sandavági hevur keypt. Ætlanin er at brúka skipið til vaktarhald í samband við oljuvinnuna.

Reiðaríið hevur eitt vaktarskip frammanundan. Tað er gamli línubáturin Mars, sum í løtuni er í Norðsjónum, har hann er vaktarskip hjá einum enskum boripalli.

*ej*



# Framsýning í Fuglafirði

- Ein áhugaverd og øðrvísi framsýning - Tað er, hvat ið Fuglafjarðar Heimavirkisfelag og Gallarí Ribarhúsi, ið saman við nøkrum seymikonum frá Eysturoynni, siga um teirra framsýning, ið verður í frá 9. sept. til og við 16. sept. Á framsýningini verða m. a patchwork teppir, quiltaðar pútir og applikeraðar mynd-ir at síggja saman við øðrum seymaðum lutum. Eisini fer Orkis at hava ymsar dekoratiónir og antikar møblar við á framsýningini.

Seymikonurnar úr Eysturoynni, ið vóru við til at taka stig til hesa framsýning, ætla sær at hava eina aðra tílíka framsýning í heyst og vetur. Endamálið við framsýningini er at vekja áhuga fyri kreativari seyming

9. sept. kl. 15.00 fer Randi Vang at hugleiða um seyming og lappar, og onkur fer at syngja og spæla. Framsýningin er opin hvønn dag millum kl. 15.00 og 17.30 í Gallarí Ribarhúsið í Fuglafirði. Kaffi verður eisini at fáa.

# Nýggjur ljóðbókalisti frá Býarbókasavninum

Býarbókasavnið hevur givið út ein ljóðbókalista á 146 síður, ið er eitt yvirlit yvir allar ljóðbøkur, ið eru til taks á bókasavninum. Býarbókasavni hevur føroyskar og danskar ljóðbøkur innan nærum allar skaldskapargreinir, bæði fyri børn og vaksin. Ein samandráttur er undir hvørjari bók, ið sigur eitt sindur, hvat hon er um.

Ljóðbøkur verða útlæntar kring alt landið. Listin fæst við at venda sær til Býarbókasavnið á telefon 31 36 26 ella við at skriva til Býarbókasavnið, boks 358, 110 Tórshavn.


Sosialurin
www.sosialurin.fo



